# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2017

## 14/08-2017-07

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 07**<br>Tíð: **14. august. 2017, kl. 15:30**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis:<br>Borgarstjórin leggur fram ynski, um at fáa nøkur mál við á skrá til fundin í dag. Einmælt samtykt.<br><br>Frits Poulsen fór av fundinum kl. 18:00 |
| 16.01 - 13.02 - 13.03 - 20.04 - 22.05 - 30.06 - 14.08 - 11.09 - 09.10 - 20.11 - 18.12 | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Frits Poulsen<br>Rúni Lisberg<br>Niclas Hentze<br>Brynleif Bech |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/07**<br>• **Nýtslu-avtala, við broytingum frá MMR viðv. niðaru húsinum í Akrabyrgi.** | • Avtalan kann samtykkjast, um § 1, stk.3 verður sett inn aftur í avtaluna, og el viðurskiftini verða fingin í rættlag. |
| **Mál nr. 02/07**<br>• **Tilboð frá Dons Design uppá plátur til minnisvarðan.** | • Samtykt at keypa hesar plátur sambært tilboðnum frá Dons Design. |
| **Mál nr. 03/07**<br>• **Kloakkin á Økrum.** | • Bygdarráðið fer á staðið, og ger so av hvussu hendan verður fingin í rættlag. |
| **Mál nr. 04/07**<br>• **Mansskapsbilur til Suðuroyar sunnara sløkkulið.** | • Málið hevur verið fyri á fundi fyrr, og samtykt varð, at taka málið fyri aftur, tá FÆ 2018 verður viðgjørd. |
| **Mál nr. 05/07**<br>• **Skriv frá Búnaðarstovuni í samband við øki 29e í Víkarbyrgi.** | • Sumbiar kommuna heitir á BST um at fáa neyðugu fígging til hesa uppruddíng, síðan kann kommunan møguliga skipa so fyri, at uppruddingin verður framd fyri BST. |
| **Mál nr. 06/07**<br>• **Tilboð uppá armatur og montering.** | • Samtykt var at taka av lægsta tilboðnum, sum var frá MR-EL. |
| **Mál nr. 07/07**<br>• **Umsókn frá Sumbiar skúla til lektiu hjálp skúlaárið 2017/2018.** | • Samtykt var at stuðla við 6 tímum um vikuna. Játtanin má ikki nýtast til transport/flutning av næmingum. |
| **Mál nr. 08/07**<br>• **Fyrispurningur frá borgara.** | • Samtykt var at uppseta hesar 10 -12 metrarnar av stiki fram við vegnum, frá hjørninum av parkeringsplássinum vestur eftir og heim til hjørni av stykkinum móti grundstykkinum hjá Jens Hera.<br>Hettar er samstundis ein eingangs samsýning fyri stykkið sum var latið til parkeringspláss |
| **Mál nr. 09/07**<br>• **Bátapláss við bátabrúgvarnar í Lopra.** | • Samtykt var at bátaplássini eru bert til bátar, sum eru skrásettir í sóknini og til borgarar í kommununi.<br>Bátaplássini verða nummereraði frá |

| | |
|---|---|
| | vestri- og eystureftir frá nr. 1 og uppeftir. Ì fyrsta umfari verður løgd 6 pláss út.<br>6 umsóknir um bátapláss eru innkomnar, og eru hesar frá Òla Jákup Krossteig, Brestir Vestergaard, Johannes Nielsen, Trygva Nielsen, Àrna Stenberg og Magnus Jacobsen Síðani var trekt ímillum innkomnu umsóknirnar og fall tað soleiðis út:<br>Bresti nr. 1<br>Johannes nr. 2<br>Óla Jákup nr. 3<br>Tryggvi nr. 4<br>Árni nr. 5<br>Magnus nr.6<br>Plássini verða tilpassaði eftir breidd á bátunum. Samtykt var at hvørt pláss kostar 100,- kr./mána, ella 1.200,- kr./ ár. Leigu sáttmáli verður sendur til leigararnar tá hesar eru klárar til undirskrivaðan. |
| **Mál nr. 10/07**<br>• **Umsókn um byggiloyvið til altan&hjall.** | • Samtykt at geva byggiloyvi sambært innsendu umsókn og skitsu. Umsøkjarin verður biðin um at halda seg 2,5 m frá granna markinum. |
| **Mál nr. 11/07**<br>• **Tilboð uppá stoyping.** | • Samtykt at taka av hesum tilboðið frá FA Jákup J Joensen uppá stoyping. Hettar tilboð ljóðar uppá 250kr x 2 mans í maks 4 vikur og 250 kr x 2 mans í maks 2 dagar. |
| **Mál nr. 12/07**<br>• **Umsókn um stuðul.**<br>• **Umsókn um stuðul frá Tvøroyrar Billardfelag.** | • Samtykt var ikki at stuðla hesi verkætlan<br>• Samtykt var ikki at stuðla hesi umsókn. |
| **Til støðutakan / kunning.**<br>• **Skriv viðv. skaði 235158.**<br>• **Skattainntøkurnar.**<br>• **Kunning um gøtuna niðan til Skorafoss.**<br>• **Parkerings viðurskiftir á kai økinum í Lopra.**<br>• **Ynski um ábøtur í Lopra.** | • Bygdarráðið var á staðnum og hugdi eftir hesum. Ein meiriluti í bygdaráðnum samtykti, at gera eina drening frá kamarsvindeyganum og niðan til hoyggjhúsið, og so leggja rør út í ánna. B.B. meinti hesin skaðin kann gerast innanífrá.<br>• Kunna var um skattainntøkurnar.<br>• Kunna var um at nú er alt klárt til at byrja uppá hesa gøtu.<br>• Kommunan vil heita á bilførarar av stórum akførum, um ikki at parkera á Ònavíksvegnum, men heldur vesturi í Ònavíkini, eystanfyri bygningin hjá Kirvi. Hettar tí, at tað trupult hjá eitt nú oljubilum og øðrum stórum akførum at koma framvið.<br>• Samtykt var at taka veitina upp, við Siglugøtu. |

| | |
|---|---|
| | |
| **Til lukkaðan fund.**<br>• | |

Fundurin lokin kl. 19.15

Eyðbjørn Thomsen Frits Poulsen

Rúni Lisberg Niclas Hentze Brynleif Bech

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA